KVØLDSKRÁ
Á HANDILSSKÚLANUM
várhálvan 2002

INNSKRIVINGARSEÐIL

Ættarnavn:	Føðingardagur:
Fornavn:	Starv/arbeiðsplass:
Gøta:	Tel arbeiðsplass:
Postnr./bygd býur:	Tel heima: / Teldupost adr.:

Merkonom, Havn (setið kross)

*Leiðsla og samstarv	mikud.	18.00-20.30	☐
*Virkisfyriskipan	mánad.	18.00-20.30	☐
*Virkisbúskapur	týsd.	18.00-20.30	☐
*Kreativar loysnir	mánad.	18.00-20.30	☐
*Fyriskipan og strategi	hósd.	18.00-20.30	☐
*Starvsfólkafyrisiting	týsd.	18.00-20.30	☐

Merkonom, Klaksvík

*Virkisfyriskipan	mánad.	18.00-20.30	☐
*Ársroknskapur	mikud.	18.00-20.30	☐
*Starvsfólkafyrisiting	týsd.	18.00-20.30	☐

Merkonom, Vágar

*Greining og fígging	mánad.	18.00-20.30	☐
*Virkisfyriskipan	mikud.	18.00-20.30	☐

Merkonom, Suðuroy

*Virkisbúskapur	mánad.	18.00-20.30	☐
*Virkisfyriskipan	mikud.	18.00-20.30	☐

*45 tíma lærugrein. Prívtøka í mai 2002

Kostnaður:
Merkonom, luttøkugjald: kr. 400,00
Depositum: kr. 250,00 fyri hvønn persón.

Freistin at tekna seg til kvøldskúlan er 12. desember 2001. Skúlagongdin byrjar 7. januar 2002.

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku.

Merkonom

Allar merkonomlærugreinar hava tríggjar tímar um vikuna.

Á heysti 2002 er ætlanin at bjóða hesar merkonomlærugreinar út:

	Serligar fortreytir
• **Grundlærugreinarnar**	ongin, uttan í Virkisbúskapi
• **Innovation**	krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prívtøku í kreativum loysnum, Organisatión og strategi og Virkisfyriskipan.
• **Búskaparstýring**	krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prívtøku í Virkisbúskapi, Ársroknskapi og Greining og fígging.
• **Logistikk**	krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prívtøku í Keyp, International distribution, Leiðsla og Samstarv, Virkisfyriskipan og Virkisbúskap.

Ætlanin er treytað av, hvørjar lærugreinar verða á vári 2002. Lýst verður nærri við hesum í mai/juni 2002.

Vanligar fortreytir:
Útbúgving á handils- og skrivstovuøkinum. Hetta umfatar til dømis:
- Lærlingaútbúgving á handils- og skrivstovuøkinum
- FHS við vinnuroyndum í minst tvey ár
- HH við vinnuroyndum í minst eitt ár

Ella
- At umsøkjarin hevur aðra fakliga útbúgving

Ella
- At umsøkjarin heur relevantar vinnuroyndir í minst tvey ár, og skúlin metir hann at vera egnaðan.

Serligar fortreytir:
Fyriskipan og Strategi: krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prívtøku í Virkisfyriskipan.
Ársroknskapur: krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prívtøku í Virkisbúskapi.
Greining og fígging: krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prívtøku í Virkisbúskapi og Ársroknskapi.

Ivast tú, ring og spyr eftir vegleiðara

Hygg annars á heimasíðu skúlans www.hsh.fo undir serstøk upptøkukrøv, frítøku og breytir.

undirskrift **dagur**

FØROYA HANDILSSKÚLI - Postrúm 177 - 110 Tórshavn - Tel 317177 - Fax 313374
t-postur hsh @hsh.fo

Teoriskúlin á Glyvrum

Koyrikort nú!
-nýtt skeið er byrja

Johan Beder, tel. 210 821
Ole Lykke, tel. 220 972
Hugo Kristiansen, tel. 225 225

Sosialurin - 311820

Restlagur

til sølu.

Kioskin í Hoyvík
tlf. 312783, 311808 ella 284793

Sosialurin -har tað hendir

Eftirlitsmaður

Søkt verður eftir eftirlitsmanni til setan fyrst í komandi ári.

Uppgávan:
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum, sum verða boðað til sýn. Starvið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verða røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini.

Førleikakrøv:
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum royndum innan økið. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur royndir sum lastbilamekanikari.
Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt.
Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

Setanartreytir:
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri. Setanin er treytað av endaligari játtan.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Búgva Apol, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. desember 2001.

Bileftirlit Føroya
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaatøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 17 fólk.

Fólk
til Skiljihøllina hjá IRF á Hagaleiti

Søkt verður eftir trimum fólkum til Skiljihøllina hjá IRF á Hagaleiti, at byrja 2/1-2002, ella skjótast tilber.

Tey, ið sett verða í starv, koma at arbeiða í Skiljihøllini á Hagaleiti, men mugu tola at verða sett til onnur arbeiði innan IRF.

Tað er ein fyrimunur at hava arbeiðsroyndir, vera fyrikomandi og at hava góð samstarvsevnir.

Galdandi sáttmáli: Fastlønarsáttmáli millum FA og FAG.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443343, ella 225383, Marius Jacobsen.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

IRF
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39 · FO-520 Leirvík

innan 7. desember 2001

Fiskimálastýrið

Fulltrúi til Fiskiveiðieftirlitið

Starv sum fulltrúi á Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskiveiðieftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:
- Dagligu ábyrgdina av eftirlitinum við føroyska fiskiskapinum í NEAFC, NAFO, Íslandi og Grønlandi og málsviðgerð í hesum sambandi
- Taka sær av skipanini viðvíkjandi avreiðing av fiski í Føroyum og uttanlands frá føroyskum skipum
- Skipa fyri føroyska eftirlitinum í NEAFC og NATO
- Samstarva við NEAFC og NAFO um eftirlitsspurningar
- Luttaka á fundum uttanlanda hjá NEAFC og NAFO

Førleikakrøv:
- Hægstu nautisku útbúgving ella relevanta fiskivinnuútbúgving
- Hava góð evni at samskifta á føroyskum norðurlendskum og enskum máli
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Hava góð samstarvsevni

Hollar starvsroyndir er ein fyrimunur.

Setanartreytir:
Løn- og setanartreytirnar eru sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og deildir/stovnar tess, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheitið er fulltrúi og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til deildarstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Fiskimálastýrið tlf. 353030 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra á Fiskiveiðieftirlitinum.

Umsóknir:
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 11. desember 2001 kl. 15.30.
Umsóknir skulu sendast til:

Fiskiveiðieftirlitið,
Postsmoga 347, 110 Tórshavn

Høvuðsreingerð
Frá A til Z til
Fyritøkur, Stovnar, Skúlar, Privat, Skip
Teppireins, Bona G lv,
Fastar avtalur til vinnulívið
Vaskarí & Reingering
Kvalitets reinger s ani 198
Tel • 21 13 12 • 31 63 00

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR, NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Skjót tevering

Danstein Tel. 318323 Tel. 447512 Tel. 217512 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

Sethús á Haraldstrød 14, Tórshavn, til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða húsini á Haraldstrød 14 seld.

Stødd á grundøki 441 m².

Húsini eru í trimum hæddum: Kjallari 95 m², stovuhædd 95 m² og loftshædd 71 m².

Barnavinarligt umhvørvi og sera gott útsýni.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ó. J. Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

Grundstykki til sølu

Eitt grundstykki í nýggjari útstykking í bygdini á Langasandi er til sølu fyri 90.000 kr.

Stykkið er 500 fermetrar, byggibúgvið, planerað og vegur er gjørdur oman á stykkið. Sera gott útsýni.

Áhugað kunnu ringja til

312440 ella fartelefon 217510

Lesið internet Sosialin !



Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Broyting í ferðaætlanini

Frá týsdegnum 27. november og árið út, siglir Smyril dubulttúr týsdagar
Siglt verður soleiðis:

Av Havnini kl. 10:00
Av Tvøroyri kl 15:30

Víst verður til heimasíðuna ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Sosialurin
Sosialurin i